Skert tolleftirlit á flogvøllinum

Tollarin stendur og bí›ar eftir, at onkur kemur til avgrei›sluna

Mynd: Edvard Joensen

Tollararnir á flogvøllinum siga seg hava fingi› bo› um ikki at ste›ga fer›afólki, sum ikki sjálvbo›in koma til tollavgrei›sluna. Økisstjórin sigur seg ikki kenna hesi bo›ini

Edvard Joensen

Flogvøllurin: Fer›afólk, sum komin eru um flogvøllin í Vágum seinastu dagarnar, hava undrast á, at ta› er nógv lættari at koma ígjøgnum tollin, enn ta› hevur veri› fyrr. Fólk ver›a ikki ste›ga›, sum tey annars vanliga hava veri›.

Á Tolleftirlitinum í Vágum ver›ur sagt, at ta› kemst av, at tollararnir frá lei›sluni hava fingi› at vita, at ta› er eitt sindur ivasamt, um framgangshátturin, sum altí› hevur veri› n‡ttur í samband vi› tollgrei›slu, hevur veri› heilt rættur. Ivi var› sáddur um, hvørt tollararnir uttan ví›ari høvdu ræt til at bi›a fólk lata vi›føri upp og kanna ta›.

Tolararnir vísa til Tolllógina, sum heilt greitt sigur, hvussu farast skal fram, og har er eftir teirra meting eingin ivi um, at ta›, teir altí› hava gjørt, er rætt.

Men bo›ini vóru, ver›ur sagt av Tolleftirlitinum, at tey fyribils skuldu bí›a vi› at gera størri rannsóknir, til nærri bo› komu frá stjóranum og Toll og Skattstovuni og løgfrø›ingunum hjá Fíggjarmálast‡rinum.

Til tey bo›ini eru komin, siga tey á Tolleftirlitinum í Vágum, ver›a bara fólk, sum sjálvbo›in koma til diskin, tollavgreidd.

Søgan ljó›ar heilt margháttlig, tá havt ver›ur í huga, at um allan heim ver›ur vi›føri› hjá fer›afólki kanna› av tollarum.

Sosialurin vendi sær til økisstjóran á Toll og Skattstovuni, Vága Øki og spurdi um grundgevingina fyri at geva slík bo›.

Økisstjórin avvísti blankt at hava givi› slík bo› yvirhøvur. Hon hev›i als ikki tosa› vi› tollararnar um slíkt, seg›i hon.

Tollararnir hinvegin hildu fast vi›, at tey høvdu fingi› tey bo›ini. Tr‡ fólk samstundis. Og at stjórin á Toll og Skattstovuni eisini kendi til tey.

Hesum nokta›i stjórin á Toll og Skattstovuni fyri, tá hann var› bi›in um vi›merking til máli›.

Hinvegin var› bla›ma›urin heilt stutt eftir at hava tosa› vi› økisstjóran í Vágum, sum tá var stødd í Fíggjarmálast‡rinum á Argjum, ringdur upp av ø›rum persóni í St‡rinum á Toll og Skattstovuni vi› áheitan um ikki at skriva naka› um máli›. Bla›ma›urin vildi tó ikki ganga hesi umbøn á møti.

Lei›slan á Toll og Skattstovuni heldur uppá, at tollararnir í Vágum hava eingi bo› fingi› um, at teir ikki skulu kanna vi›føri› hjá fer›afólki, sum ikki sjálvbo›in leggja ta› opi› á diskin.

Tollararnir hinvegin siga, at eftir at Sosialurin hev›i tosa› vi› lei›sluna á Toll og Skattstovuni, var› tó sagt frá lei›sluni, at onkur misskiljing hev›i helst veri›. Ta›, sum meint var› vi›, var at tey ikki skuldu kanna øll fer›afólkini, sum komu vi› flogførunum, tí ta› kundi seinka bussunum, sum skuldu vi› ferjuni um Vestmannasund.

Slíka grundgeving duga tolleftirlitsfólkini ikki at skilja. Og als ikki eftir, at Sosialurin ehvur gjørt tey varug vi›, at lei›slan á Toll og Skattstovuni eingi bo› sigur seg hava givi› teimum yvirhøvur.

Ein av tollarunum sigur ta› vera løgi›, at lei›slan í tollvaldinum skal vera bangin fyri at seinka rutuni í samband vi› arbei›i› hjá Tolleftirlitinum. Sjálvur hevur hesin tollarin veri› uttanlands og arbeitt, har hann hevur veri› vi› til at kanna rættiliga nógv fer›afólk, uttan at nakar hevur óttast fyri, hvat bussførarnir uttan fyri lufthavnina fóru at siga til ta›.

Ta› tykist í løtuni heldur ógreitt, hvat hvør hevur givi› hvørjum bo› um. Tríggir tollarar siga seg hava fingi› bo› frá lei›sluni um ikki at kanna vi›føri hjá fer›afólki, sum ikki sjálvbo›in koma vi› tí.

Lei›slan sigur seg fyrst als ongi bo› hava givi›, og í ø›rum lagi onnur bo› enn ta›, tollararnir hava skilt.

Eftir stendur so, at bara tey fer›afólk, sum munnliga uppl‡sa fyri tollarunum, hvat tey hava at gjalda toll av, ver›a avrokna›. Hini, sum einki siga og bara ganga ígjøgnum, ver›a ikki ste›ga›.

Tollarar í Havn funnu rúsevni

Undir vanligum rutinueftirliti funnu tollararnir her fyri hash umbor› á grønlendskum trolara, sum koma á Havnina á veg til Grønlands. Yvirtollarin sigur, at ta› fysiska eftirliti› eigur at styrkjast

Edvard Joensen

Tórshavn: Tollararnir í Havn vóru her fyri umbor› á grønlendska trolaranum Polar Arfivik, har teir funnu 100 gram av hashi, sum helst var› ætla› at fara ví›ari til Grønlands.

Kjartan Dam Joensen, yvirtollari í Tórshavn, sigur, at tollararnir funnu hashi› undir vanligum fysiskum rutinueftirliti›. Hann f‡list tó á, at tollvaldi› hevur ov lítlar møguleikar til slíkt eftirlit.

Hendan nøgdin ikki er serliga stór í ví›ari samanhangi, ásannar yvirtollarin í Havn, men leggur aftrat, at hashi›, sum funni› var›, hevur eitt hampiliga stórt vir›i á grønlendska markna›inum.

Talan var í hesum førinum bara um eitt vanligt rutinueftirlit, sigur yvirtollarin. Ta› er vanligt, tá fari› ver›ur umbor› solei›is, at teir eru væl manna›ir, og solei›is var eisini hesafer›.

Kjartan Dam Joensen sigur, at teir plaga at hava hund vi› til slíkar kanningar. Bæ›i teirra egna narkohund, umfram at teir hava samstarv vi› løgregluna um at leiga hund og førara frá løgregluni. Hetta samstarv hevur rigga› væl, sigur yvirtollarin. Eisini hinvegin, tá løgreglan sendir bo› eftir hundinum hjá tollvaldinum.

Yvirtollarin sigur, at ta› var tó ikki hundur, sum fann hashi› umbor› á grønlendska trolaranum hendan dagin. Ta› var goymt á einum slíkum sta›i, at hundur slapp ikki til ta›, men ma›urin, sum kanna›i sta›i›, fann ta›, sigur hann.

Ta› var ikki gjørligt at finna nakran eigara til hesa nøgdina av hashi, sum funnin var umbor› á trolararnum. Hald var› lagt á hashi›, sum løgreglan sí›an fekk í var›veitslu, sum vanligt er at gera, sigur Kartan Dam Joensen.

Ta› vóru nakrir føroyingar vi› grønlenska trolararnum, men tollvaldi› heldur seg vita, at eingin teirra kann setast í samband vi› hashi›.

Kjartan Dam Joensen sigur, at ta› er ikki so vanligt at finna hash og onnur rúsevni, sum føroyingar hava samband vi›. Hann sigur seg tó vera vitandi um, at rúsevni eru í landinum, men heldur ikki, at ta› kemur bara solei›is hissini vi› onkrum skipi. Hann metir ta› vera skipa›an flutning, sum í dag fer fram vi› rúsevnum.

Higartil í ár hevur tollvaldi› funni hálvtanna› kg av hashi, sum ávísast kann, skuldi brúkast í Føroyum. Ta› er komi› ymsar vegir. Á fer›afólki bæ›i loft- og sjóvegis, vi› posti og hvussu fólk nú finna upp á at senda ta›.

Hetta er lítil nøgd í mun til okkurt anna› ár. Í 1997 var samla›a nøgdin, hald var› lagt á, sambært ársfrágrei›ingini hjá Rúsdrekka- og Narkotikará›num, knapt 36 kg. Men tá vór›u 34 kg funnin umbor› á einum grønlendskum skipi, sum skuldi til Grønlands vi› tí. Í fjør var nøgdin gott hálvttíggjunda kg. Men annars hevur nøgdin í nógv ár ligi› stø›ug millum eitt hálvt og tr‡ kg, eftir sum hagtølini hjá Løgregluni og Rúsdrekka- og Narkotikará›num siga frá.

Av ø›rum rúsevnum kemur ikki ta› stóra, sigur Kjartan Dam Joensen, yvirtollari. Í fjør vór›u nøkur fá gram av amfetamini og kokaini funnin uppi á einum persóni.

Kjartan Dam Joensen sigur, at Tolleftirliti› ikki hevur møguleika at vera so virki›, sum ynskiligt var. Gjørdar ver›a javnan stakroyndir, men ta› metir hann vera bara næstbest. Hann vildi fegin havt møguleika, pengar og fólk, til at komi› nógv meira út úr húsinum. Tí ta› er ey›sæ›, at ta› er vi› tí fysiska eftirlitinum, at úrslitini vísa seg, sigur Kjartan Dam Joensen, yvirtollari í Havn.

Hann letur annars væl at samstarvinum, Tolleftirliti› hevur vi› grannalondini. Tætt samstarv er vi› eitt nú Danmark, Noreg og Íslands umframt Skotland og Hetland.

Kjartan Dam Joensen heldur tó, at ynskiligt kundi veri›, um fleiri ábendingar frá privatfólki komu til tollvaldi›, tá tey vistu um eitthvørt ólógligt, sum var› flutt inn. Eitt nú narkotika ella anna›.

Gle›ir seg at koma til Føroya at arbei›a

N‡ggi læknastjórin á Landssjúkrahúsinum hevur veri› tvær stuttar fer›ir í Føroyum í seinastuni og kunna seg vi› umstø›urnar her

Anne Grethe Mikkelsen tekur fyrsta desember vi› starvinum sum læknafakligur stjóri á Landssjúkrahúsinum. Hon hevur arbeitt í Føroyum fyrr og heldur, at ta› er ein spennandi avbjó›ing at vera vi› til at mynda lei›sluna á Landssúkrahúsinum

LÆKNASTJÓRI

Áki Bertholdsen

Ta› ver›ur hendan konan, sum hereftir ver›ur tri›ja beini›, sum eitt av landins allarstørstu arbei›splássum kemur at standa á.

Hetta er Anne Grete Mikkelsen, sum nú skal vera læknafakligur stjóri á Landssjúkrahúsinum.

Anne Grete Mikkelsen tekur 1. desember vi› starvinum sum læknafakligur stjóri á Landssjúkrahúsinum og sostatt er ovasta lei›slan á okkara høvu›ssjúkrahúsi loksins fullmanna›.

Anne Grethe Mikkelsen er 58 ára gomul og hon er í løtuni umsitingarligur yvirlækni á sjúkrahúsinum í Faaborg á Fjóni í Danmark. Hon tók læknaprógv í Århus í 1970 og fekk serlæknavi›urkenning í internum medisini í 1981. Hon hevur veri› yvirlækni í Faaborg sí›ani 1991 og veri› administrerandi lækni har sí›ani januar 1993.

Umframt læknafakligu útbúgvingina, hevur hon holla útbnúgving í lei›slu og fyrsiting.

Setanin ver›ur, sum hjá sjúkrahúslei›aranum og sjúkrarøktarstjóranum áramálssett í fimm ár.

Ikki ókunnug vi› Føroyar

Hóast Anne Grethe Mikkelsen er donsk, er hon ikki heilt ókunnug vi› føroysk vi›urskifti, tí eitt skifti í 1985 var hon eisini yvirlækni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi í fimm mána›ir.

Henni dámdi sera væl í Føroyum og tá fekk hon sjálvsagt eisini eitt innlit í føroyska heilsuverki›.

Tá i› eg so sá, at l‡st var eftir læknastjóra til Landssjúkrahúsi›, gjørdi eg av at royna eydnuna, sigur hon.

Og ta› loysti ta› seg at søkja tí sum kunnugt fekk hon starvi›.

Sí›ani hon var› sett, hevur hon eisini veri› tvær stuttar fer›ir í Føroyum, her hon hevur kunna› seg vi› umstø›urnar á Landssjúkrahúsinum. Nú kemur hon ikki aftur, fyrrenn hon tekur vi› starvinum.

Hon sigur, at hon gle›ir seg at koma til Føroyar at arbei›a og hon heldur, at ta› ljó›ar sum ein spennandi avbjó›ing at standa á odda fyri læknafrø›ini á okkara høvu›ssjúkrahúsi.

Men hon fæst ikki at siga naka› um, hvat hon heldur er serliga avbjó›andi.

Hon sigur, at hon hevur avtala› vi› restina av lei›sluni á Landssjúkrahúsinum, at hon skal onki siga um framtí›ina hjá sjúkrahúsinum, ella um sínar metingar av stø›uni, fyrrenn hon hevur tiki› vi› starvinum og hevur sett seg betri inn í vi›urskiftini.

- Ta› vildi veri› skeivt at sagt sína meining um vi›urskifti, sum eg veit ov líti› um. Ta› vildi altí› kunna› veri› vent og snara› og misskilt og ta› hev›i ikki tænt nøkrum endamáli, sigur Anne Grethe Mikkelsen.

Ta› hevur annars gingi› sera strilti› at fáa ovastu lei›sluna á landssjúkrahúsinum manna›a. Strí› ímillum læknar og sjúkrasystrar førdi í fleiri ár vi› sær, at máli› lá óloyst til miklan ampa fyri allar partar.

Strí›i› snú›i seg um, antin Landssjúkrahúsi› skuldi hava eina tvístreingja›a lei›slu vi› einum røktarfakligum stjóra og einum læknafakligum stjóra á jøvnum føti, ella um talan skuldi vera um eina einstreingja›a lei›slu vi› einum lei›ara vi› evstu ábyrgdini.

Eftir strí› í fleiri ár samdust læknar, sjúkrasystrar og politiski myndugleikin um eina lei›sluskipan vi› trimum fólkum, einum sjúkrahúslei›ara vi› evstu ábyrgdini fyri Landssjúkrahúsinum, einum læknafakligum stjóra vi› læknaligu ábyrgdini og einum røktarfakligum stjóra vi› ábyrgd fyri røktini.

Undir hesi tr‡streingja›u lei›sluni ver›ur landssjúkrahúsi› so b‡tt sundur í tríggjar høvu›sdeildur, eina medisinska deild, eina skur›deild og eina psykiatriska deild. Á hvørjari deild ver›ur ein lei›andi yvirlækni vi› evstu ábyrgdini og beint undir honum ver›ur ein yvirsjúkrasystir, sum fær ábyrgdina av røktini.

Í ovastu lei›sluni á Landssjúkrahúsinum fara sostatt at sita frá 1. desember: Jóanis Erik Køtlum, sum er sjúkrahúslei›ari, Marin Vang, sum er røktarfakligur stjóri og Anne Grete Mikkelsen, sum er læknafakligur stjóri.

Mi›vingar úti og heima

Um eina gó›a viku fara mi›vingar aftur í ball. Tá ver›ur tann árliga bygdaveitslan, sum ber heiti› »Mi›vingar úti og heima«

Sveinur Tróndarson

Ta› er 11. ári› á ra›, at skipa› ver›ur fyri hesi veitsluni, sum gevur mi›vingunum — nær og fjar — eitt høvi› at ganga aftur á gamlar gøtur at hittast.

Sermerkt fyri veitsluna er, at hon ver›ur hildin í røttum Mi›vágsanda. Skipa› er fyri gó›um bor›haldi, og me›an maturin sm‡gur sær ni›ur, ver›ur hugleitt um farna tí›. Og meiri enn so kemur ta› fyri, at okkurt skemtingarsamt ver›ur havt á lofti eisini.

Árni Jacobsen, sum er ein av fyrireikarunum, sigur, at bygdaveitslan hevur veri› serstakliga væl vitja seinastu árini.

- Ta› hava veri› um eini 350 fólk og ta› er á gó›ari lei›, sigur hann.

Meginparturin av hesum eru mi›vingar úr Mi›vági, men kortini kemur nokk so fitt av avbygdafólki eisini, leggur hann afturat.

Kostna›urin fyri veitsluna er 200 krónur fyri hvønn, og fyri ta› fáa gestirnir ein gó›an bita, okkurt at leska sær vi›, huglei›ingar og ein gó›an dans.

Tey, sum ætla sær til bygdaveitslu í Mi›vági skulu bo›a frá í seinasta lagi hóskvøldi› 2. november klokkan 21.00. Ta› kunnu tey gera vi› at ringja til Árna Jacobsen á telefon 332687 ella til Mariu Johansen á telefon 332645.

Veitslan ver›ur í bygdarhúsinum leygarkvøldi› 4. november klokkan 19.30.